Óli Jacobsen skrivaði grein hin 25. feb. 2009, um sorgarhendingina við General Gordon.

# General Gordon fór úr Hvalba á síni feigdarferð

85 ár kann tykjast at vera ein long tíð. Men kortini eru fleiri sum minnast hesa tíðina, og sum eisini kunnu greiða frá henni.

Men tað er greitt, at hesi fólkini fara at fækkast. Tískil hevur høvi verið nýtt til, umframt tær skrivligu keldurnar, sum finnast, at tosa við fólk, sum vara av hesi hending, og sum kunnu greiða frá henni. Her er fyrst og fremst talan um børn hjá teimum sum fórust.

Fyri at lýsa hetta tíðaskeiðið fer í Miðvikuni eisini at verða tikið í aftur tær stóru vanlukkurnar, sum hendu í 10 ára skeiðnum 1910-1924 serliga við atliti til Suðuroynna, sum varð hart rakt hesi árini. Tað vóru eisini nógvar vanlukkur við bátum, men tær stóru skipsvanlukkurnar hetta skeið vóru hesar:

Í 1914 fórst Robert Miller úr Vági við 11 monnum. Nærri hevur verið greitt frá hesi vanlukku í 100 ára greinini um Diin í Porkeri.

Í 1915 er skaðagrindin í Sandvík, har 14 mans úr Hvalba og Sandvík umkomust.

Í 1916 gongur Ruthland úr Vestmanna burtur við 15 monnum.

Í 1919 ganga tveir bátar úr Hesti burtur. Fyrst sakna teir ein bát, so fer ein annar bátur út at leita. Hann kom heldur ikki aftur. Hestur misti 11 menn hendan dagin.

1920 er eitt vanlukkuár, sum tilsamans kostar 62 mannalív. Kristina ferst við 15 monnum, nógvir av teimum frá Gjógv. Tað er greitt frá hesi vanlukku í røðini vit høvdu í Miðvikuni við Dinnufíu Ferjá frá Gjógv.

Men afturat Kristinu farast tvey suðuroyaskip. Hesi eru Helena við 20 monnum og Karin við 13 monnum.

Í 1922 ferst Norðlýsið úr Fuglafirði á veg til markna við 7 monnum.

**Vanlukkuárið 1924**

1924 er eisini eitt vanlukkuár. Av skipum norðanfjørðs gongur toftaskipið Anna burtur. Hetta er ein hending, sum er hampiliga væl kend. Hetta er fyrst og fremst orsakað av, at vit vita, hvar hetta hendi, og at líkini av teimum flestu av manningini komu í kristna jørð í Reykavík. Eisini ger minningarhaldið, sum fiskimannafelagið skipaði fyri í Íslandi í 1999 í gamla kirkjugarðinum í Reykjavík, hendingina kenda. Tað er júst sett ein navnapláta á grøvina. Hetta hevur eisini verið umrøtt í bløðunum.

Umframt fórst hetta árið av suðuroyaskipum General Gordon við 19 monnum og Sjóriddarin við 8 monnum.

**General Gordon**

Henda umrøðan verður í øvugtari raðfylgju, so byrjað verður við árinum 1924. Ein skrivlig kelda er Erling Poulsen, sáli, sum gjørdi heilt fitt fyri at fáa niðurskrivað okkara fiskimannasøgu. Vit høvdu nógv saman, og hann gav mær loyvi til frítt at nýta hansara tilfar, eins og hann eisini fekk nyttu burtur úr tí, sum eg sjálvur skrivaði.

Mortensens menn keyptu í 1923 úr Lysekil í Svøríki eina slupp, ið bar navnið General Gordon.

Hon varð bygd í 1884 í Brixton, var merkt 87 brt, og hon hevði motor.

Poul Michelsen í Búð í Hvalba, ið var búsettur á Sevmýri á Tvøroyri, førdi hana hetta árið. Árið eftir fór hann 25. februar av Tvøroyri yvir á Suðurlandið, men General Gordon spurdist ikki aftur. Teir eru komnir nakað nær Íslandi, tá ið teir eru burturgingnir, tí Poul Johannes Beder í Vági, vanliga nevndur Pollurin, førdi Lauru tað árið, og teir funnu toppstongina á General Gordon, tá ið teir komu yvir á Suðurlandið. Teir tóku hana inn og høvdu hana heimaftur við sær og kendu, at tað var toppstongin á General Gordon. Hon lá í fleiri ár í kjallaranum hjá Pollinum, men tá ið hann fyrra partin av 1930-árunum fekk sær radio, setti hann hana sum radiomastur oman fyri húsini. Seinni datt hon niður, og Torkil Beder, prestur, sonur Pollin, segði, at hann sagaði knappin av henni, men at hann tíverri var blivin burtur.

**FF-blaðið: General Gordon er farin**

Tað hevur lítið og einki verið at finna í bløðunum í teirri tíðini um forlissið. Táverandi FF-blaðið hevði eina minningargrein, sum var soljóðandi:

“Kann henda, at eg í tí vátu grøv skal sova mín síðsta blund; tó eg elski at ferðast um høv til mína síðstu stund.”

So hevur skaldið sungið um hin føroyska fiskimannin, og ivaleyst er tað, at ikki halda hesar vanlukkurnar Føroyingar frá at søkja sjógvin.

Og tað er gott, at so er, tað er so í øllum yrki. “Vandi er í hvørjari vælferð!” sigur orðatakið, og satt er tað. Vit eru ongatíð trygg, hvar vit fjakka á foldum. Óhappið, ja, deyðin finnur øll. Trygdin er einans at finna í tí, at vit vandra fyri Guds ásjón, hvar vit enn ferðast á landi ella á sjógvi, og at vit altíð eru í hansara varatekt.

Men harfyri er tað líka meint, líka sárt, líka nívandi hvørja ferð óhappið rakar tey einstøku menniskjuni. Tey mugu uppaftur og uppaftur saman ganga gjøgnum hina somu trongdina, bíða og bíða í tóman heim, meðan hin síðsta vónin fjarar út úr hjartanum, og síðan taka upp strevið aftur, royna at bøta um skaðan, sum hon harða lagnan sló.

Henda syrgiliga hending við General Gordon verður ein av teimum, sum verður við at nerva í langar tíðir, tí vit einki vita.

Eftir sita ikki minni enn 9 einkjur. Hvalbiar bygd hevur verið verst fyri, og tað nýtur so mikið fastari har, sum at sama bygdin fyri stuttari tíð hevur verið fyri tveimum stórum vanlukkum á sjónum. Fyrst hin herviliga skaðagrindin í Hvalba og síðan Helena, sum fórst á havinum í 1920.

**Teir sum fórust vóru hesir:**

- Poul Michelsen í Búð, skipari, 32 ár, Tvøroyri. Giftur, 3 børn
- Ewald Norðberg, 22 ár.
- Poul Johannes Ludvig, 19 ár. (Beiggi til Meinhard Ludvig)
- Poul Jespersen, 45 ár. Giftur. 9 børn sótu eftir. 10. barnið var sonur hansara
- Jógvan Sofus Jespersen, 19 ár, sum fórst saman við honum.
- Jákup Eliesar Herluf Axelvold, 16 ár.
- Jóan Jákup Frederik Poulsen, 35 ár. Giftur, 9 børn
- Dánjal Jákup Jensen, 36 ár. Giftur, 3 børn
- Niels Petur Poulsen, 29 ár. Giftur, 2 børn.
- Meinhard Ludvig, 17 ár. (Beiggi til Poul Johannes Ludvig)

- Jens Ludvig, 25 ár, beiggi Meinhard. Giftur, 1 barn
- Niels Jákup Michelsen, 27 ár.

**Hesir vóru allir úr Hvalba.**

- Johan Klæmint Karl Christiansen, 18 ár, Tvøroyri.
- Gunnar Frederik Dalbert Vang, 18 ár.
- Mortan Leo Petersen, 19 ár.
- Jákup Mathias Jacobsen, 20 ár.

**Hesir tríggir vóru úr Froðba.**

- Emil Frederik Martin Heinesen, bestimaður, 24 ár, Sunnba.
- Símun Johan Vang, kokkur, 32 ár. Giftur, 1 barn, Fámjin
- Óli Petersen, 42 ár, Skálavík.

**Johannes misti pápan við General Gordon**

Roynt hevur verið at fáa samband við fólk, sum kunnu greiða meira frá um General Gordon. Tí varð um dagarnar vitjað inni á eldrasambýlinum í Hvalba, tey vóru bæði blíð og fyrikomandi.

Her hitti eg tann 93 ára gamla Johannes Poulsen. Pápi hansara Jacob var ein av manningini á General Gordon. Hann var 8 ára gamal, tá ið pápin fórst, so hann minnist sum rímiligt er væl pápan. Mamman var Henrietta, vanliga kalla Jetta. Tey vóru upprunaliga níggju systkin, men ein tvíburabeiggi Johannes, Elias, doyði sum smádrongur. Børnini vóru frá 0 til 12 ár, tá ið tey mistu pápan. Yngsta barnið, ein genta, hevði ikki fingið navn og varð doypt Jacobina eftir pápanum. Hon giftist til Klaksvíkar við Símun Michael Christiansen, og tey bæði eru einastu systkini, sum liva eftir.

**Seinasti dagur í Føroyum hjá General Gordon**

Á sambýlinum hittu vit eisini tann 91 ára gamla Olivur Holm. Hann mintist púra klárt júst tann dagin í dag fyri 85 árum síðani, tá ið General Gordon fór avstað seinastu ferð.

Skipið kom av Tvøroyri við teimum av manningini, sum var komin umborð har. Í Hvalba skuldi so restin av manningini takast umborð, áðrenn farið varð til Íslands. Hetta var ein so sera vakur morgun og púra slætt var í sjónum. Skiparin var jú ættaður úr Hvalba, og Olivur minnist, at Poul fór niðan til foreldrini hjá sær at siga teimum farvæl. Síðan komu faðir og sonur oman á mølina, og Olivur minnist, at Poul helt um hálsin á pápa sín. Hetta má sigast at vera eitt vakurt seinasta minni um hann.

At so nógvir mans fóru burtur var jú ein stór hending í bygdini, so alt bygdarfólkið kom saman fyri at siga monnunum farvæl við kendu heilsanini: ”Jesus verði við tykkum” og svarinum: ”Hann verði eftir hjá tykkum.” Og mangt tárið man vera fallið. Øll vistu í hesum tíðum, at tað var als ikki vist, at tey komu at síggjast aftur.

Men so kemur løtan, tá ið skiparin heldur, at nú man vera best at fara. Tað var umráðandi, at seglini kundu fáast upp, meðan vindurin var so makligur, sum tað varð sagt. Hetta merkti, at best var at fáa seglini upp, meðan tað var lítið av vindi. Víst hevði General Gordon ein lítlan motor, men framvegis vóru seglini høvuðsálitið.

Tá var eingin kai í Hvalba, so manningin mátti førast umborð í árabátum. Menn høvdu jú eisini viðføri, so tað mátti førast fleiri ferðir.

Segl vórðu sett, og General Gordon fór avstað. Vit kunnu ímynda okkum, at mannamúgvan hevur eygleitt skipið, til tað hvarv úr eygsjón.

**Blivu teir niðursigldir?**

So gekk tíðin til sluppirnar vanliga komu aftur undan Íslandi. Men eingin General Gordon kom. Tað varð bíðað, vóna og biðið. Tað kundi jú verið onkur náttúrlig frágreiðing fyri seinkanini. Men ein dagin mátti staðfestast tað, at General Gordon kom ikki aftur, og at aftur ein manning hevði fingið eina váta grøv. Tað farvæl, tey høvdu sagt manningini hendan vakra morgun, var tað seinasta.

Eingin visti við vissu, hvat ið var hent. Eitt herviligt høgættarveður brast á longu tann 29. februar, og menn hildu, at hon kundi vera farin í tí veðrinum. Men nøkur ár seinni kom fram ein merkilig søga.

Ein hvalbingur hevði siglt við einum trolara úr Vestmanna. Teir vóru á ísfiskaveiðu og landaðu fiskin í Grimsby. Eina ferð fór nakrir av manninginini á eina barr.

Vit eitt annað borð sótu nakrir enskir trolaramenn og drukku. Einaferð koma hesir menn til ilnar. Føroyingarnir skiltu enskt, so teir hoyra alt, ið verður sagt. So einaferð rópar ein av trolaramonnunum til hin: ”Hetta skal ikki vera sum við General Gordon!” Tá skiltist á prátinum, at trolari, har ein av hesum monnum var skipari, hevði siglt á General Gordon, og síðan var stungin av. Søgan segði eisini, at General Gordon varð raktur framskips og masturin og seglini endaðu frammi á bógnum á trolaranum.

Teir eru á veg til Bretlands, og tá ið teir nærkast landi gevur skiparin manningina boð um at koyra leivdirnar av General Gordon til sjós. Men hesum noktaðu teir fyri. Ter hava ikki troystað sær. Tískil mátti skiparin sjálvur fara á dekkið at gera hetta.

Fyrstu ferð eg hoyrdi um General Gordon var frá tí tá 100 ára gamla Andreas í Tarti úr Oyndarfirði. Hann mintist so sera væl til, og hann mintist eisini hesar vanlukkur, sum føroyskir fiskimenn komu út fyri.

Hann var triðja árið til skips í 1924, og hann mintist væl, at tað vóru fleiri suðuroyarskip, sum høvdu verið uppá prei hjá teimum at spyrja, um teir høvdu sæð General Gordon. Tá hevur hann verið saknaður.

Andreas hevði hoyrt hesa frásøgnina frá beiggja skiparan á General Gordon. Hann visti eisini, at General Gordon hevði 3 forsegl og 2 toppsegl, sum øll endaðu inni á dekkinum á trolaranum.

Um hetta passar ber illa til at siga. Men tað finnast fleiri dømi um, at skip sigldu á hvørt annað. Sambært Peter J. Sigvarsen er tað greitt, at Kristina, sum hvarv í 1920, varð niðursigld. Tað sama vita vit var við Florence í 1927. Onnur dømi eru eisini.

Poul í Búð var beiggi Mikkjal í Búð, sum var gingin burtur við Helenu i 1920. Ein triði beiggi, sum var skipari, var Tórur í Búð. Men hann fekk ikki fólk aftaná General Gordon. Fólk vóru farin at halda, at tað var óeydna við beiggjunum.

**Einkjurnar vóru kempur**

Johannes var farin í skúla, tá ið hetta hendi. Hann gekk í skúla við Bakkhús, har handilin við sama navnið er. Lærari var Hans Pauli Holm.

Spurningurin er so, hvussu kláraði ein familja seg, nú forsyrgjarin knappliga var farin? Tryggingin tá var í hvussu er ikki nakað serligt, og mamma Johannes sat eftir við átta børnum. Men tað eydnaðist Jettu at hava øll børnini heima. Hetta var ikki nøkur sjálvfylgja. Tað var ikki óvanligt í slíkum umstøðum, at børn fóru til onnur at vera.

Fremsta frágreiðingin var, at fiskimannakonurnar vóru kempur. Tær vóru vanar at skipa fyri húsinum tann partin av árinum, menninir vóru burtur. Nú fingu tær so alla ábyrgdina, og hana megnaðu tær eisini.

Annað svar var samanhald millum fólk og tað, sum í dag kallast samhaldsfesti, har fólkið hevði umsorgan fyri hvørjum øðrum.

Tað sum hjálpti júst í hesum førinum var, at tey hjá Johannesi áttu eitt sindur av jørð, 12 gyllin. Hetta gav møguleika fyri at hava kúgv og at fáa nakrar seyðir.

Alt hetta kravdi eisini arbeiðsmegi. Børnini í húsinum máttu hjálpa við øllum arbeiði í húsinum.

Annars hjálptu øll í bygdini til. Menninir hjálptu eisini við at hava faðirleysu dreingirnar við sær til dømis, tá ið farið varð á flot, og teir fingu so eisini part.

**Einkjurnar fingu kol**

Í Hvalba var so nógv kol, at tey skóru ikki torv. Hesir gomlu minnast bert luktin av torvi frá tí, teir komu framvið Sandvík í báti!

Við kolinum varð eisini hugsað um einkjurnar. Tað var soleiðis, at tað kol, sum var arbeitt millum jól og nýggjár fór til einkjurnar, og tær fingu ført tað til hús. Tær fingu eisini møguleika at fáa tað kol, sum kundi finnast í dungunum aftaná framleiðsluna.

Mótsatt øðrum bygdum var ikki nógv saltfiskaarbeiði í Hvalba. Men eingin kundi hungra í Hvalba. Her var nógvur útróður, og fiskurin varð keyptur og arbeiddur í bygdini.

Hvalba var eisini eitt gott grindapláss við døglingum sum ískoyti. Her vóru fuglabjørg, har fuglur ikki treyt. Og so var so nógvur seiður. Tað lá væl fyri at kasta nót. Tá kundu fáast stórar nøgdir. Einkjurnar vóru ongantíð gloymdar, tá ið býtt varð.

Tað var eisini vanligt í Føroyum, at tá ið børnini, serliga dreingirnir vuksu til, hjálptu tey til fíggjarliga við húsarhaldinum.

Johannes fór 14 ára gamal til skips við Emerald hjá Mortensen, sama reiðarí sum hjá General Gordon. Kanska hava teir viljað hjálpt familjuni við at taka hendan faðirleysa dreingin við.

Seinni í 1936 komu Johannes og Olivur at sigla saman við City úr Norwich, har Niels Pauli Holm var skipari. Hann var beiggi Olivur.

Undir krígnum sigldu teir tó ikki. Hesa tíðina arbeiddu nógvir hvalbingar í kolinum, sum stórur tørvur var á í landinum.

Hetta var sum so gott arbeiði, men tað gekk fyri seg 600 metur inni í fjallinum. Har var sera skýmligt, og trygdin var sera vánalig. Tað var altíð vandi fyri, at loftið í gongini datt niður. At forða hesum skuldu stúttur setast upp undir loftið. Men tað var so sum so við tí. Ofta máttu menn sjálvir hava hesar stúttur við sær til arbeiðis. Tað hendu eisini vanlukkur, og fleiri mans doyðu av vanlukkum í minunum. Hildið verður, at tað var væl sloppið, at tað ikki gekk verri.

Johannes var til skips í eini 30 ár. Hann hevur eisini arbeitt í Íslandi og Grønlandi. Eisini hevur hann arbeitt nógv ár á Bacalao. Tað vóru fleiri suðringar, sum gjørdu hetta, og sum fóru til hús í vikuskiftunum.

Johannes er sera lættsintur. Í sínum yngru árum spældi hann harmoniku til dans. Nú hevur hann leitað sær harmonikuna fram aftur, og kann lættliga spæla ein góðan. Tað gjørdi hann eisini hendan dagin, vit vóru á vitjan.

Johannes giftist við Sonny, sum var úr Hvalba. Tey fingu børnini Jan, Finn Eiler, sum doyði sum smádrongur og Kammu. Systirsonur Johannes, Dybeck Marinoson, vaks upp hjá teimum. Jan hevur eisini dugnað hesi frásøgn.

**Erling Poulsen mundi blivið faðirleysur**

Í 2004 greiddi Erling Poulsen frá í Dimmalætting, at tað var um reppið, at hann sjálvur bleiv faðirleysur við General Gordon. Skiparin Poul í Búð ringdi um veturin til pápa hansara, Mortan Poulsen, og bað hann til bestamann við General Gordon. Hann játtaði, tí Poul í Búð fiskaði væl og var góður at vera saman við sum skipari. So hevði General Gordon eisini motor, og hevði hetta nógv at siga í 1924.

Men Mortan hevði eisini søkt kjans við hvalabáti í Lopra, og einar átta dagar áðrenn teir skuldu fara avstað við »Gordon«, fær hann at vita, at hann hevði fingið stýrimanskjans við einum av hvalabátunum hjá støðini í Lopra.

Nú vóru góð ráð dýr. Mortan var ógvuliga harmur um at seta Poul í Búð í eina ringa støðu at tørva ein bestamann, tí nú vóru øll skipini fullmannað. Hann ringdi so til hansara og segði hvussu vorðið var. Mortan segði síðan mangan, at hann ongantíð gloymdi Poul tað aftur, hvussu vakurt hann tók hesa støðu. Poul sigur við Mortan, at sjálvandi skuldi hann taka kjansin við hvalabáti, tí teir hanga ikki á trøunum. Poul kundi sagt sum so, at nú var ov seint at siga upp, tí nú fái eg ongan annan bestamann, men tað gjørdi hann so ikki. Poul spurdi Mortan eftir øðrum skiparalærdum monnum, men hann var glaður um, at hann ikki hevði víst honum á nakran.

**Malena misti dreingin**

Poul í Búð fær so fatur á tann 24 ára gamla Emil Heinesen í Sumba og biður hann koma sum bestimaður við sær. Hann hevði júst fingið skiparaprógv og skuldi annars fara til skips við einum norðanfjørðsskipi.

Emil var trúlovaður við Malenu á Longini í Leirvík og hevði keypt grundstykki inni á Toftanesi. Hann ætlaði at búsetast í Leirvík. Tilfarið var bílagt og tekningin til húsini var gjørd og er enn til í ættini hjá Malenu.

Tað er sama stykki, sum Ársæll Jensen, vanliga nevndur Salle, seinni bygdi síni hús á. Salli var beiggi Oskar Jensen, sum fyri kortini doyði í Íslandi 102 ára gamal, sum greitt frá her í blaðnum.

Malena var í Sumba og ferðaðist, áðrenn General Gordon fór avstað. Eina náttina, eftir at Emil var farin avstað, droymdi hon, at tey svóvu í hvør síni song í einum kamari. So sær hon seingina hjá Emil fara undir í sjógvi. Morgunin eftir byrjar hon at fortelja verpápan um dreymin. Men hann brýtur hana av og sigur: ”Nú vil eg ikki hoyra meira!”

Malena giftist seinni við Sylveriusi á Mýrini, og tey búsettust í Leirvík. Tey fingu tvær døtur. Ein dóttir teirra Klara, gift við Grími Rasmussen í Klaksvík, eitur eisini Emilia, uppkallað eftir Emil. Ein heilbeiggi, Otto, var eisini. Hann fórst eisini á sjónum. Men tá var Malena deyð, so hon varð spard fyri hetta eisini.

Klara fortelur frá mammu síni, at hon varnaðist, at okkurt ófrættakent var, tí tá hon sá menn standa og práta í túninum, og hon nærkaðist, tá tagdu teir. Tá hevur tosið verið um General Gordon, sum einki frættist frá.

Tað er minst ein onnur søga um ófrættakendan dreym í samband við General Gordon. Jutta Mortensen í Havn vaks upp í grannalagnum hjá Poul í Búð á Tvøroyri, og hon var á sama aldri sum døtur hansara. Tí kom hon inn hagar dagliga.

Pápi hennara Frederik fortaldi, at eina náttina eftir, at General Gordon var farin avstað, hevði hann droymt Poul í hvítum gummistúvlum. Hetta gav honum eina ófrættakenslu av, at her ruggaði ikki alt rætt. Seinni kom hann eftir, at dreymurin var samstundis sum illveðrið, tá ið hildið var, at General Gordon var farin.

Hetta var ein slíkur kavaroksstormur av norði, at tey flestu skipini av Tvøroyri, ið vóru farin avstað stutt undan hesum veðri, komu inn aftur við skaða.

___________________________

**Sangir um General Gordon**

Aftana vanlukkuna yrkti Jacob Vang í Froðba tveir sangir. Hann var føddur 7.9. 1903 og doyði 1.6. 1979. Hann hevur tískil bert verið 20 ár, tá ið hann yrkti hesar sangir. Tað var vanligt at yrkja sangir í samband við slíkar tilburðir, og hesir vísa hvussu roynt var at ugga tey eftirsitandi.

Vit prenta annan sangin í hesum partinum og hin í komandi parti.

Um Jacob Vang kann annars sigast, at hann var beiggi Daniellu, konu Poul í Búð. Tá ið hann í sanginum vísir til svágin er tað Poul. Hann misti eisini tveir beiggjar við General Gordon. Teir vóru Gunnar Frederik Dalbert og Símun Johan, sum var giftur til Fámjin, og teir vísir hann eisini til.

Hann gjørdist sjálvur skipari og førdi millum onnur skip Signhild, sum seinni gjørdist til Active hjá Jógvan Jensen í Havn, sum er umrøddur í røðini Hendur ið Sleptu fyri kortum.

Jacob kom í 1939 út fyri eini serligari hending. Í november hetta ár neyðlendi eitt týskt flogfar á Tvøroyrarfirði við Skarvatanga. Tveir bjargaðu sær sjálvum til lands, meðan tveir aðrir blivu undir ringum umstøðum bjargaðir til lands av Jacob. Fyri hetta varð hann heiðraður av Carnegiegrunninum við kr. 400.

Tað kann sigast, at tað var lagnunnar speisemi, at hann skuldi bjarga monnum frá einum heri, sum longu árið eftir kom at kosta okkum so nógv.

Hesir menn vórðu annars settir í varðhald í Havn. Ein av teimum, sum kom at ansa eftir teimum, var Johan Norðfoss. Hesum greiddi hann frá í røðini, vit høvdu við hann í fjør. Teir vístu ikki nakað serligt takksemi fyri bjargingina!

**En Sang Melodi: Nu tak for alt**

Nu Sorgen trykker mit unge Bryst,
Og Kinden vædes af salte Taarer,
Dog Hjærtet sagte i Brystet slaar,
Og Blodet flyder i Aarer.

Nu Sorg er kommen til Hjemmet brat,
Alt om de kære fra Hjemmet rejste,
De skulde ud over Bølgen snart,
Og Sejlet frejdigt oprejste.

Fra Hjemmet tog I en smuk Afsked,
Alt fra de kære I havde hjemme,
Men vi ej tænkte det saa skulde bli,
At Havet tog jer i gemme.

O Brødre kære to har jeg har mist,
Fra spæde Aar vi vokste sammen,
Men snart i Verden jeg sidder trist
Men samles atter med Gammen.

I Havet fik I saa kold en Grav,
Og Graven prydes med Tang fra Havbund,
Der fik I Hvilen, som Gud jer gav,
Og ankrer ej mer paa Sandgrund.

I Hvil har faaet ved Jesu Favn,
Og Ankret har I ved Himlens Strande,
Ja, hvil jer trykt udi Himlens Havn,
Der er de herlige Lande.

Den kære Kaptejn paa Gordon var,
Dens stolte Navn over Bølgen førte,
Men ej jeg tænke paa dette Svar,
At graven dennem tilhørte.

O, kære Svoger den bitre Død,
I Havet maatte du Graven finde,
Din Mø hun sukker i Sorgens Nød,
Og Taarer falder fra Kinder.

Kun kort var Tiden i Livet her,
Du med din hustru som Mand var vorden.
Hun savner borte nu Vennen kær,
Og sukker tungt imod Jorden.

Du Trøsten var for din unge Viv,
Men Snart fra Verden Gud dig hjemkaldte,
Dog Sorgen vækkes af afskeds Smil,
Da du fra Hjemmet udrejste.

Et Lys for hende du var den Stund,
Som Gud lod eder tilsammen være,
Men du i Havet fik Dødens Blund,

**Langt fra de Smaa dine kære.**

Med Haandetag udi Himlens Sal,
Der skal vi Vennen og Venner finde,
Da fri fra Sorgen vi være skal,
Og Livets Enighed finde.

O, Brødre kære og Svoger god,
Som nu ved Havbund blandt Tang mon hvile,
I faar i Himlen jo Sjælebod
Og ind til Frelseren iler.

Jeg glad vil blive til sidst engang,
Naar jeg jer møder i Himlens Lande,
Da jubler Hjertet af Glædens Sang,
Og frelst fra verdslige Vander.

Nu tak for alt fra at vi var smaa,
Som kære Brødre vi var tilsammen,
Nu glade I ind til Tronen staar
Og synger Frelserens Amen.

De stakkels Enker som sukker tungt,
Som kun de smaa har til Sorgens Modstand,
Skønt et er vokset, et andet ungt
Ser kun paa Bølgernes Legvand.

Ja, mangen Kvinde er nu forladt
I Verden og i dens Strid og Møje,
De kun til Himlen sin Lid har sat,
Til Hjælperen i det Høje.

O kære Venner og sørger ej,
Hold op at fælde de salte Taarer,
Thi Sorgen hjælper os intet nej.
Den vil kun Hjærtet haardt saare.

Hvad hjælper Sorgen, hvad hjælper Savn,
I Verden er alt kun tomt og øde,
Men udi Himlen det bliver til Gavn,
Da vi skal gaa dem imøde.

Vi finder dem udi i Himlens Land,
Da frydes vi ved hinandens Side,
Der ses ej Bølgerene slaa imod Land,
Men kun de herlige Lide.

---

# Pápi Sunnevu var skipari á General Gordon

Óli Jacobsen endurgevur her frásøgn hjá Sunnevu Niclassen, sum misti pápan við General Gordon. Men maður hennara Herluf var 35 ár seinni við til at bjarga eini aðrari manning í eini líknandi støðu sum henni hjá General Gordon. Mamma Sunnevu fann sær sín hátt at lívbjarga sær og børnunum

Óli Jacobsen

04.03.2009

Vit hava hitt ta 88 ára gomlu Sunnevu Niclassen úr Bø. Sunneva er sera skilagóð og minnist væl. So er eisini eitt serligt við Sunnevu. Hon dugur væl at yrkja og skriva, soleiðis, at fólk leggja tað til merkis.

Hetta fekk eg eitt stuttligt dømi um. Tá eg greiddi konu míni frá, at eg skuldi tosa við Sunnevu, mintist hon væl til eina yrking, sum Sunneva hevði havt í bløðunum fyri nógvum árum síðani um skip, sum lógu innifryst á Kappanum. Nakrar dagar seinni hevði hon funnið yrkingina fram. Tá hevði hon goymt hana í síni Bíbliu í heili 40 ár, síðan hon var 13-14 ára gomul! Hon er fiskimannadóttir, og tí hevur hetta havt sína ávirkan á hana.

Sunneva er dóttir skiparan á General Gordon Poul Michelsen í Búð, sum var ættaður úr Hvalba, men sum búði á Sevmýri á Tvøroyri millum kirkjuna og fótbóltsvøllin. Mamman var Daniella, dóttir Jacobinu og Thorman bónda á Bø í Froðba. Hon var systir Atu Elisabeth, sum var seinna kona Jógvan Jensen, sum var umrøddur herfyri í røðini Hendur ið Sleptu. Thormann og tey vóru 9 systkin frá tveimum giftum. Tað vóru 50 ár millum Thormann og yngsta systkin. Tí eigur Sunneva framvegis eina 92 ára gamla abbasystir á Eiði!

Poul var føddur í Hvalba 17. februar 1892. Hann tók skiparaprógv hjá Jens í Dali í 1915. Undan General Gordon hevði hann ført Agnes Louise í 1916 og 1917 og Tjaldrið í 1918 og fram til 1923.

Sunneva var bert 3-4 ára gomul, tá ið pápin doyði, so tað er akkurát so, at hon hómar hann spæla við børnini á gólvinum.

Sunneva minnist sum so ikki annað, enn at tosað varð um, at General Gordon var gandaður longu í Lysekil, haðani skipið varð keypt.

Men hon minnist sjálvsagt, hvussu tað var at gerast faðirleys. Tær vóru tríggjar systrar, tvær vóru yngri. Onnur var Dinna, gift við Sofus Joensen, sum hevði handil á Sevmýri í mong ár. Poula, uppkallað eftir pápanum, búði niðri

**Mamman fór at læra til ljósmóður**

Mamma fór niður til Danmarkar at læra til ljósmóður. Hetta var hennara loysn at kunna gerast einaforsyrgjari. Men hetta var eitt megnartak, serliga tá í tíðini. Hon var eitt ár niðri. Hetta var heppið, tí aðrar ljósmøður máttu ganga tvey ár uttan at læra meira.

Sunneva var tá seks ára gomul beint farin í skúla á Tvøroyri. Hon fór tá at vera hjá ommuni og abbanum á Bø og fór í Froðbiar skúla. Hinar báðar systrarnar búðu hjá tveimum mammusystrum.

Eitt ár kundi vera leingi at vera burtur frá sínum børnum, men Daniella gloymdi tey ikki. Sunneva minnist, at hon plagdi at senda pakkar heim, helst keyptar fyri tann lummapening, sum hon fekk. Sunneva minnist serliga eitt vakurt fyriklæði og einar reyðar gummistúvlar. Ein dagin, Sunneva kom úr skúla, var ein stór dukka komin. Tá var frøði.

Mamman kom so aftur, men tað gjørdist ikki so nógv arbeiði sum ljósmóður at byrja við hjá henni. Tað var longu ein ljósmóður á Tvøroyri, sum sat nógv ár eftir, at mamman hevði lært. So tað gjørdist nokk so seint, at hon varð sett í starv. Men hon plagdi at fara túrar, har tað ikki lá fyri hjá føstu ljósmóðrini at fara. Hetta kundi vera yvir fjøll sum til dømis til Hovs og Fámjins. Men hon var væl dámd og fekk sum frá leið meira at gera.

Hetta kundi vera sera buldrasligt. Vegasamband var jú lítið og einki. So ferðingin var við báti og til gongu. Tað var ikki tosað um veður og vind. Tað var farið avstað, um tað stóð á húsbroti um fjøll í náttarmyrki.

Sunneva minnist til dømis, tá ið teir plagdu at koma úr Fámjin eftir mammuni. Boð komu frá telefonstøðini til Daniellu um at gera seg klára. Heima eygleiddu tey so lyktirnar hjá monnunum, so hvørt teir nærkaðust. So var at fara yvir um fjørðin í báti. Ofta var tað so ringt, at teir máttu leggja seglið útyvir hana. Daniellu dámdi ikki at fara í bát, men har var einki sum æt. Ein fámjinstúrur var serliga ringur. Tá máttu menninir neyðhalda sær og henni við hjálp av fjallstavum. Tað var snøgt sagt ikki framkomandi fyri stormi. Daniella var ljósmóður í eini 40 ár. Hvør túrur gav 10 kr, og tað kundi vera nógv stríð av at fáa hendan pening til høldar.

Sunneva minnist eisini, hvussu óhugnaligt tað plagdi at vera, tá ið bankað varð á hurðina um náttina, tá ið onkur kom í ljósmóðurørindum. Ofta var ikki telefon, so boðini máttu koma heim eftir henni, og teir bankaðu hart uppá hurðina fyri at fáa mammuna at vakna. Hetta dunkið situr í Sunnevu enn.

Men Daniella var løtt at fara upp og var skjót í tey hvítu klæðini. Hon hevði altíð

sínar greiðir í ordan og kundi finna tær í myrkrinum og so avstað.

Tað var sera óhugnaligt, tá mamman fór út í náttina. Men tær vóru tó ikki einsamallar. Ein mammusystir kom altíð til teirra.

**Ósjónligu hendurnar hjálptu**

Daniella var sera dugnalig, ikki bert sum ljósmóður. Hon seymaði og bant alt, sum tey brúktu, og handalagið var av tí besta.

Sunneva heldur, at eitt faðireyga hugdi niður til teirra. Hann, sum sigur seg vera verja hjá einkjum og faðirleysum, gloymdi tey ongantíð.

**Ein dagin tær komu úr skúla sigur mamman:**

“Nú kundi húsið verið brent niður hjá okkum.” Hon hevði sett eina grýtu útá fyri at smelta gásafeitt. Eldur kom í feittið, og login stóð næstan upp undir loftið. Mamman var einsamøll í køkinum. Tað var so trongt millum komfýrin og borðið. Login stóð yvir ímóti vindeyganum, so hon slapp ikki út. Hurðarnar vóru afturlatnar. Men við eitt var tann logandi grýtan tikin av komfýrinum og blakað út í túnið. Sunneva minnist væl, at grýtan lá har. Ósjónligar hendir høvdu latið báðar hurðar upp og tikið grýtuna.

Daniella giftist aftur við Meinhart Eivindsson, sum eisini var úr Hvalba.

Tað kann verða nevnt, at tað er Ásmund, abbasonur beiggja Meinert, sum er íblástur til hesa frásøgn.

Tey fingu tveir synir. Meinhart doyði fleiri ár undan Daniellu, so hon gjørdist einkja tvær ferðir.

Hon helt fram sum ljósmóður til hon gjørdist 70 ár. Men tá var alt blivið so nógv lættari.

**Høvdu bæði pengar og ikki**

Mamman sat annars hampiliga væl eftir. Pápin hevur átt pengar, so hann sat í nýggjum og góðum húsum. Alt var nýgjørt, málað og betrekt. Tað var ovnur í hvørjum kamari, men tað var tó ikki toilet. Hetta var ikki vanligt tá.

Hvør av døtrunum fekk eina bankabók uppá 800 kr. men hon var bundin til tær vóru 21 ár. Hetta var ikki heilt lítið, tí henda upphædd svaraði til ársløn hjá fiskimanni tá í tíðini. Men upphæddin mátti ikki rørast.

Tað hava verið fátækir dagar. Pápin hevur átt pening tilgóðar hjá Mortensen, sum var reiðari hjá honum. Tey gingu har og keyptu, inntil einki var eftir at keypa fyri.

Tá kundi sparikassabókin verið hent, men amtmaðurin sum umsat hetta, segði nei.

Heta merktist millum annað, tá ið gestir komu á Jóansøku. Teir vóru so fínir,

sum Sunneva og tey ikki høvdu ráð til at vera.

Tey liðu tó ikki neyð. Tað var eingin jørð í húsinum. Tískil áttu tey ikki kúgv ella seyð. Mjólk fingu tey frá ommuni og abbanum í Froðba. Men tey høvdu tó hønur og skóru eisini torv.

Sum greitt verður frá í eini komandi Miðviku var skiparin á Helenu, sum gekk burtur í 1920, beiggi Poul. Ein beiggi var Tóri. Sagt var í seinastu Miðviku, at menn aftraðu seg at fara við honum, tá tveir av hansara skiparabeiggjum vóru burturgingnir. Men hann førdi kortini skip fleiri ár aftaná tað.

Onkuntíð plagdu tey at fara til Hvalbiar at vitja ommuna og abban. Her var gott at vera. Ein pápabeiggja Niels Pauli var virkin í brøðrasamkomuni Vitninum. Hann var kendur fyri at duga so sera væl at syngja.

**Fór til amtmannin at arbeiða**

Tá ið Sunneva var 14 ár var farið úr skúlanum sum hjá teim flestu. Tá fór hon at arbeiða fisk. Trolarin Leivur Øssurson hjá AT var komin, og Sunneva fór til Petur Mohr Dam, sum var formaður í Driftsráðnum, at fáa arbeiði.

Fiskur var eisini at arbeiða úti í Froðba, men lønin var ikki tann stóra, nøkur oyru um tíman. Varð arbeitt í 10 tímar kundi hetta geva einar 3 kr.

Tann, sum hevði fiskaarbeiðið í Froðba, var Dánjal Mohr Mortensen. Tað var tá vanligt, at fólk tóku fisk uppá seg at vaska. Hann fekk fiskin frá Thomsen og kanska onkrum øðrum. Fiskurin kom út í Froðba við eini jakt, einum lítlum báti.

Fiskurin varð so vaskaður niðri á klettinum fyri síðan at verða turkaður á helluni. Her var gott pláss at breiða fisk á. Hetta gav so arbeiði til konufólkið í Froðba. Ein abbasonur Dánjal Mohr er annars Poul á Kletti.

Stórur munur er á Tvøroyri og Bø, har Sunneva nú býr. Tvøroyri var jú ein stórbýur. Her merktist heldur ikki sørt til klassamun, uttan at hetta tó nervaði so nógv.

Tá ið Sunneva so var 18 ár, fór hon til Havnar, og har kom hon seinni at tæna hjá amtmanninum Hilbert. Tær vóru tríggjar gentur, tvær, Aska og Judith, vóru úr Skúvoy. Sunneva var stovugenta. Hinar vóru í køkinum. Her vóru ofta gestir, so tað var nóg mikið at gera.

Sunneva var eisini hjá amtmanninum fyrst undir krígnum, og tá var tað hann, sum veruliga ráddi fyri borgum í Føroyum, nú hann ikki hevði samband við donsku stjórnina. Tí stóð hann mangan eisini fyri skotum. Tað var nógv fundarvirksemi hjá amtmanninum. Hann hevði neyvt samband við bretska konsulin Mason og við teir flokkar, sum myndaðu politiska

meirilutan í Føroyum. Her var ofta nógv at tosa um.

Hilbert átti tvey børn, son og dóttir. Tey vóru sera fitt og tey vóru væl uppdrigin. Børnini skuldu seta alt uppá pláss aftur, tá ið tey vóru liðug at spæla um kvøldarnar. Tað var einki við at lata genturnar taka alt upp morgunin eftir.

**Fann drong í Havn**

Men í Havn lá eisini fyri at hitta dreingir. Eitt kvøldi í dansi hittust Sunneva og Herluf Niclassen úr Miðvági, sum gekk á skiparaskúla. Ein systir hansara Signhild var gift við Holgar Bærentsen, so har plagdu hann at halda til.

Tað vardi heldur ikki leingi til tey giftust. Tey fluttu inn til foreldrini hjá honum í Miðvági, meðan tey bygdu, og hann sigldi. Tey fingu fýra synir og eina dóttir.

Herluf var sonur Georginu og Joen Hans Niclassen. Hann var yngstur av fýra systkjum. Hann hevði hug at fara á sjógvin, og 15 ára gamal fór hann til skips við Guiding Star. Skipari var Mourits Niclassen, á Skálalonini. Hann var ein góður skipari, ið dugdi væl at fara við teimum ungu og læra teir.

Eitt tíðarskeið var Herluf og róði út í Grønlandi. Hann fór á skiparaskúla, og síðan gjørdist hann bestimaður hjá John Nielsen í Sandavági við sluppini Elisabeth. John var eisini ein mætur skipari, sum Herluf helt nógv av.

Herluf fór aftur í skúla og tók longdina, sum tað var kallað. Hetta gav møguleikar at føra skip í Grønlandi.

Hann sigldi undir krígnum við Gudrun Zoega og fór við har í 1942. Teir høvdu so ein trolara, Nýggjaberg, men hann fórst undir krígnum við 21 monnum. Ein av hesum var Evald, beiggi Herluf.

Herluf førdi so Gudrun Zoega restina av krígnum. Teir vóru ikki úti fyri nøkrum serligum. Men teir royndu eisini at sigla eftir forskriftunum, sjálvt um hetta kundi taka eitt sindur longri tíð.

**Bjargingarbragdið við Egil**

Herluf fór so við trolaranum Varðberg, sum hann var partaeigari í. Hann var eisini nevndarlimur í mong ár.

Sofus Poulsen, okkara umboð í Aberdeen í eina hálva øld, greiðir frá, at Varðberg kom hagar í oktober 1946 og var vakrasti av øllum teim gomlu trolarunum, sum vit keyptu eftir seinna heimsbardaga. Hann var umvældur í Danmark og Petur Dahl sáli stóð vist fyri tí, sum gjørt var við trolaran. Í Aberdeen fekk hann trolútgerð.

Herluf byrjaði sum dekkari, bleiv so 2. stýrimaður, síðan 1. stýrimaður og so skipari.

Hann var so skipari í 1949. Í september hetta ár fara teir til Bjarnoynna á ísfiskaveiðu, og royndu einar 100 fjórðingar norðanfyri oynna til út í

oktober. Tá gera teir klárt at fara til Aberdeen at selja. Men hetta gjørdist ein minniligur túrur.

**Herluf greiddi soleiðis frá:**

“Eg hevði frívakt, og vit vóru farnir at sigla. Tá kom Jákup Haraldsen, sum var 1. stýrimaður, niður og vakir meg, samstundis sum hann ger mær greitt, at trolarin Egil hevði sent út neyðarkall og bað um hjálp. Hann var farin at leka og var um at søkka. Tað vóru ring veðurlíkindi, kavarok og nógvur vindur. Men her var einki at drála við.

Kós varð sett ímóti Egil og koyrt varð á Varðberg alt hann kundi klára og snórabeint komu teir fram til hann.”

**Her tekur Herluf til, at Varðberg hevði ein sera góðan peilara.**

Tað var lagt nógv til við hesi undurfullu bjargingini. Varðberg fór so nær Egil, sum tað kundi bera til, og Herluf segði, at tað vóru teir av manningini á Varðberg, sum høvdu hug til at taka hann av ræði, av tí at hann legði so nógv til.

Har vóru góðir menn innanborða, men tað vóru serliga tveir, sum Herluf setti sítt álit á. Teir vóru 1. stýrimaður Jákup Haraldsen, Jákup á Torvmansbakka og 1. meistarin Jógvan Joensen, Jógvan á Norði, báðir miðvingar. Tveir mans, sum aldri víktu frá har, teir vóru settir. Teir høvdu fylgt honum øll krígsárini og vinmenn vóru teir frá ungum av.

Í tí fjarriti sum kom úr Aberdeen frá føroyska sendimanninum Elias í Rættará, tá ið teir komu hagar, varð sagt, at Varðberg gjørdi eitt bragd, tá ið teir bjargaðu manningini.

**Frásøgn var eisini í blaðnum THE PRESS AND JOURNAL í Aberdeen tann 31. oktober 1949.**

Søgan var tann, at Egil hevði eitt sunnukvøld kl. 6 siglt á eitt sker ella ís um 20 fjórðingar úr Bjarnoynni. Teir vóru 22 mans við. Høvdu gjørt túrin lidnan og høvdu 2.000 kassar inni.

Tað var stormur og ringur sjógvur. Gronin varð skrødd upp, og hann lak illa. Sent varð neyðarkall.

Alla náttina bardist manningin fyri at halda skipið lens, hóast hetta sá vónleyst út. Til alla lukku kom Varðberg fram á teir kl. 10 morgunin eftir. Vegna ringan sjógv og nógvan streym var vónleyst at taka menninar beinleiðis umborð. Manningin mátti tí fara í bátin, sum fýra ferðir fór millum trolararnar.

Varðberg sigldi rundanum og fekk fatur í teir hvørja ferð, seinastu ferðina við skiparanum, stýrimanninum, báðum meistarunum og skipshundinum.

Meðan teir seinastu fýra vóru á veg umborð á Varðberg brotnaði báturin illa, og sakk hann undan teimum 15-20 favnar frá Varðberg, men tað eydnaðist kortini at bjarga teimum. Tá ið skiparin fór av Egili, stóð hann nærum um

miðjuna í sjógv á dekkinum, og bert fáar minuttir seinni var hann sokkin. Bjargingin hevði tá vart í tveir tímar, og sigast kann bókstaviliga, at hon kom í síðstu løtu.

Helvtin av manningini á Egil fór umborð á Høgafoss, og komu teir allir til Aberdeen nakrar dagar seinni. Sofus sigur, at hann minnist Herluf væl. Hann var ein stás maður í allar mátar.

Einasta minni Herluf hevði um hendingina eru tær seks árarnar av bjargingarbátinum hjá Egili, sum hann tók við sær.

Henda søgan er í síni heild í bókini Bjargingarbrøgd 2 hjá Erlingi Poulsen.

Egil var annars tann gamli Norðbúgvin, sum p/f Uvak keypti til Føroya í 1939. Esmar Fuglø var skipari.

Kvívíkingar í partafelagnum Hellufossur høvdu keypt Norðbúgvan og góvu honum navnið Egil. Kvívíks Tummas var reiðari.

**Gjørdist bóndakona í Bø**

Í 1959 var sjómanslívið liðugt hjá Herluf, og tey bæði fluttu til Bíggjar, har hann bleiv bóndi. Hann seldi tá eisini húsini í Miðvági.

Hetta var eitt heilt annað lív. Víst var Herluf heima, men hetta var sera bundisligt. Tey vóru bundin at fjósinum hvønn dag.

Hetta var sera strævið. Alt var í ringum standi og óarbeiðsligt. Men Herluf var ein sera raskur maður, so tað gekk. Tey smoygdu upp um armar og tóku mangt takið.

Sum árini gingu bleiv tað ljósari. Tey fingu traktor og góða sláimaskinu og annars nútímans útgerð.

**Mjólkina seldu tey til Thedor** Thomassen keypmann, sum júst er fyltur 100 ár, sum greitt frá her í blaðnum. Tey fingu so vøru fyri mjólkina.

Í 1983 legði Herluf frá sær sum bóndi. Hann doyði í 1985, 69 ára gamal.

Vit takka Sunnevu fyri hennara áhugaverdu frásøgn.

______

**Sunneva skrivar um pápa sín**

Tann 17. februar 1982 skrivaði Sunneva hesar hugleiðingar, sum komu í Dimmalætting 27. februar 1982. Tær geva eina góða lýsing av kenlsunum hjá einum sum hevur mist pápan á sjónum

Sólin skínur so vakurt í dag, og vit gerast altíð glað og løtt í huga, tá veðrið er gott. Serstakliga gleði eg meg í dag yvir, at eg kann minnast pápa mín, sum í dag hevði verið 90 ár, um hann hevði livað. Vit, sum vóru so lítlar, kendu hann ongantíð. Vit lærdu ongantíð at siga pápi; men í hjartanum kennist gleði yvir at hava átt ein góðan pápa,

ein av teimum hetjum, sum settu lívið til fyri føðilandið.

Poul Michelsen var skipari á »General Gordon«, ið forlisti á vári 1924. Eg kann minnast, tá Kristian kongur 10-indi vígdi minnisvarðan á Torvheyggi, eg man ikki hava verið meira enn eini 5 ár.

Altíð sum smágentur gingu vit fram við minnisvarðan, tá vit fóru til, Froðbiar, og so lósu vit tað, sum skrivað stendur á tí stóra høga steininum.

Ein mynd av einum akkeri, umgirt av einum togenda, og yvirskriftin er teimum hetjunum til heiðurs. Teir sjólótust fyri føðilandið.

Niðri undir stendur á donskum: Ingen har større Kærlighed end denne, at han sætter sit Liv til for sine Venner. Johs. kap. 15. Vers 13.

Tær tríggjar stóru steinpláturnar eru tær sluppirnar, sum fórust við allari manningini, »Helena«, »Karin« og »General Gordon«.

Eg minnist hesar tríggjar pláturnar og tvær lítlar, »Riddarin« og »Karl« vóru tær fyrstu; men seinni eru fleiri komnar aftrat.

Tá eg nú eri við minnisvarðan, so fari eg at siga frá nøkrum, ið eg havi hoyrt sum barn. Tá hesin varðin varð settur, har sum hann stendur í dag á Torvheyggi, so var tað ein meining við tí, umframt tann at minnast teir sjólátnu. Hann varð settur á einum fríum øki við tí stóra steininum peikandi upp ímóti himinum og lítandi út yvir havið, har sólin rísur. Hann varð settur soleiðis, at øll før, sum komu inn um Froðbiarnípu ella inn á fjørðin, vóru var við hann, ella um eg so má siga, vóru heilsað av honum. Allar mínar barnadagar stóð hann fríur við góðum útsýni, einki hús í námind av honum, men so er ikki nú.

Okkum untist ikki at eiga og kenna pápa okkara; ta lagnu hava so mong verið fyri. Men ein er, sum aldrin gloymir tann faðirleysa; hansara lyfti standa fast, um alt annað vikast. Eitt, sum er blivið so stórt fyri mær, er hetta, at eg skal síggja pápa mín ein dag heima í himlinum. Tað verður ofta tosað um ránsmannin, sum var bjargaður av Jesusi. Mong menniskja halda, at tað hevur ongan skund at blíva frelstur; tey meina, at tey kunnu fáa ta løtuna, sum ránsmaðurin fekk. Jú, víst eru tað tey, sum fáa løtuna, so tey bjargast fyri himmalin. Men mong eru tey, sum fara so brádliga úr hesum heimi, at um tey ikki kenna Jesus áðrenn, so frykti eg fyri, at tað er vónleyst myrkur, ein ævinleiki uttan tann Harra Jesus.

Hesar hetjur, sum sóu deyðan fyri eygum, tær kundu; og teir hava rópað á Harran í neyð terra: Harri bjarga okkum, vit ganga burtur. Vissuliga, Harrin á himli høga hoyrir allar bønir og bjargar øllum, sum ynskja av hjarta at

vera bjargað av honum. Takk og prís veri Jesus Kristusi fyri allan kærleika sín, og takk veri honum fyri frelsuna, sum hann á krossinum so dýrt hevur vunnið til hvønn einstakan, sum trýr. Takk góði faðir í himlinum fyri, at vit við sálmaskaldinum kunnu siga:

**Gud gev okkum øllum**

tað landið at ná,
har skyldfólk og vinfólk,
vit uppaftur sjá.

Tá hirðin sítt fylgi,
úr mold og úr bylgju
skal savna, har sorgin
um ævir er av.

Tí deyður er deyðin
og horvið er hav.

———

**Sangurin hjá Jacob Vang**

Í fyrra parti høvdu vit annan sangin, sum mammubeiggju Sunnevu, Jacob Vang, yrkti í samband við General Gordon.

**Hesa ferð hava vit hin:**

I Sømænd som paa Bølgen staar
I tænker paa den sidste Vaar
om Heltene fra Land udgik
og Dødens Blund i Havet fik.

Vi Sømænd, som til Søen gaar,
vi tænker ej paa Herrens Vaar;
da Gud os kalde skal herfra,
hvor skal vi finde Havnen da?

De Sømænd som i Vaar udgik
og Hvilen sin i Havet fik
i Søens Gang i Bølgens Skød,
der nyder de sin Søvn saa sød.

I mangt et Hjem nu Sorgen er,
der savnes borte Venner kær,
de stakkels Børn som lider Nød,
de raaber tit paa Pabba sød.

De stakkels Kvindehjerter slaar,
de sukker tit og fælder Taar;
din Far er død i Bølgens Gang
men vækkes op ved Harpens Klang.

Vi finder ham i Himlens Land,
der staar han paa den gyldne Strand
og venter der, dem han har kær;
mit Barn, tænk paa, find Fader der.

Der Fader sine Børn da ser
og Søstre finder Brødre kær,
i Himlens lyse land de er
for aldrig, aldrig skilles mer.

Ja, mangen Sømands Helt for hen
og Havet tog dem i sit Gem.
De stolte Skuder er forlist
de bliver ej de første ej de sidste.

Hver Ungdoms Helt tag mod i Bryst,
som pløjet Havets vilde Lyst.
Naar Stormen raser, Bølgen slaar,
og skuden mangen Brækker faar.

Ja Bølgen ofte truer nær,
og ofte vi i Graven ser;
men unge Helt, du tab ej Mod,
stol du paa Herrens Vagtmand god.

En Vagtmand vi kan faa ombord,
som aldrig svigter ved sit Ror.
Han bølgen lægger og dens Hær
så atter vi i Stilhed er.

Naar Solen skinner Havet ler,
hvor dejligt er det Morgenskær,
da glædes vi ved denne Dag
og flittig gaar vi til vor Sag.

Men Stilhed ikke altid er,
ej heller Solens Straaleskær;
da Nød og Død for Øjet staar,
og Skuden under Søen gaar.

Det knager højt i Bord og Baand,
vor Skude er i ynksom Stand,
da Sejl og Mærs er skyllet bort,
da ses jo Graven ganske sort.

Lad Døden ej overraske dig,
se til at Jesus løfter dig.
Med stærke Arm han tager dig
i Himmelborgen hjem til sig.

**Fiskimenninir á Kappanum**

Sum dømi um yrkjaragávurnar hjá Sunnevu endurprenta vit hendan sangin. Sunneva minnist, at skipini sluppu úr ísinum, so skjótt yrkingin var prentað!

**Lag: Fangens brev**

Atlantsfarið, Kongshavn, Bjørnin hvíta
á Kappaøki fastar liggja enn:
heimferð ísurin teimum sýta,
læst um tær hann hevur sínar tenn.

Innanborða Føroya synir stinnir,
til fiskarí teir løgdu út á hav,
við Grønlands strendur royna mið og grynnur,
sum áður mangan fongin teimum gav.

Men Grønland sveik og ísurin teir spottar
sítt kalda andlit vendir móti teimum –
at knúsa fiskiførini hann hóttir,
so aldri meira teir vinna skullu heim.

Ongan fisk, bert kulda, sakn teir kenna,
ongan post og einki kærligt orð;
spakuliga vikur, mánaðar renna,
í fangalegu eru teir umborð.

Syrgnir út á ísin dreingir stara,
og mót Føroyum hugsan teirra ber
til ta gentu, sum teir hava kæra –
um hon leingist, og um trygg hon er.

Hin lítli, ið til skips er fyrsta túrin,
fjálga heim og mammu minnist hann.
Við gráturødd hann spyr, so kaldur, stúrin,
nær til mammu heim hann sleppa kann.

Pápin blundar, minnist smáar hendur
rættar biðjandi móti sær;
troyttur hann í svøvnloysi sær vendir,
suffar: “Gævi Gud, eg heima var!”

Bø 1.10.1969